Álit

í

løgtingsmáli nr. 2/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (At taka løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan undir føroyskt ræði)

Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Bjørt Samuelsen, Kristina Háfoss, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram 3. august 2020, og eftir 1. viðgerð 1. september 2020 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10. september, 29. oktober, 4. og 12. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við fútan, umboð fyri Politistafelag Føroya, Kriminalforsorgina og arrestina í Mjørkadali, sýslumannin fyri Norðoyggjar og Eysturoy, Amnesty International, Advokatfelag Føroya og við løgmann, Bárð á Steig Nielsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bill Justinussen, Brandur Sandoy, Frimodt Rasmussen, Jaspur Langgaard, Beinir Johannesen og Heðin Mortensen) tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Meirilutin hevur ymiskar viðmerkingar.

Bill Justinussen, Brandur Sandoy, Frimodt Rasmussen, Jaspur Langgaard og Beinir Johannesen hava hesar viðmerkingar:
Undir viðgerðini hevur verið vist á, at fongsulsviðurskiftini í Føroyum ikki eru nøktandi. Orsøkin er í høvuðsheitum, at vit bert hava eitt varðhald í Føroyum, sum er ætlað varðhaldsfangum og ikki teimum, sum sita dóm. Sostatt hava vit ikki røttu umstøðurnar til tey, sum sita dóm í Føroyum.

Hóast tey, sum varða av umstøðunum í Mjørkadali, gera eitt framúr arbeiði at tryggja báðum pørtum, t.v.s. teimum, sum eru í varðhaldi og teimum, sum sita dóm, nøktandi umstøður, hava undirritaðu ta fatan, at tey, sum sita dóm, ikki hava øll síni rættindi.
Undirritaðu halda, at landsstýrið eigur at seta ferð á arbeiðið at fáa til vegar nýtt fongsul í Føroyum. Hetta skal tryggja, at føroyingar kunnu sita dóm í Føroyum við fullum rættindum. Kanska mest týðandi rættindi eru at varðveita sambandið við síni nærmastu. Og síðani eisini at kunna fáa fulla úrtøku úr tí týðandi arbeiði, sum brotsmálaumsorganin ger fyri at búgva tey, sum sita dóm, til aftur at koma út í samfelagið og gerast góðir samfelagsborgarar.

Heðin Mortensen hevur hesar viðmerkingar:
Undirritaði metir ikki, at tíðin er tann rætta at fremja yvirtøkur. Undirritaði heldur, at yvirtøkur skulu fremjast so hvørt, sum tað er fíggjarliga ráðiligt, og at yvirtøkur ongantíð mugu koma fram um vælferðina hjá okkum føroyingum. Undanfarna samgonga hevði stórt yvirskot á fíggjarlógini, umleið hálva aðru milliard samanlagt. Var hetta talið framvegis galdandi, hevði tað ikki verið óhugsandi, at vit framdu onkra yvirtøku í nærmastu framtíð. Men sitandi samgonga hevur vent yvirskoti til stórt undirskot, eisini hóast útreiðslur í sambandi við koronusmittuna ikki verða taldar við.

Fíggjarpolitikkurin hjá sitandi samgongu hevur eisini havt neiliga ávirkan á haldførið í landskassanum.

Undanfarna samgonga tordi at taka meira frá fiski- og alivinnuni, heilar 300 milliónir meira vórðu tiknar inn, sum fóru út aftur til samfelagið við fleiri og betri vælferðartænastum og sum skattaminking til lág- og miðallønt; samstundis sum grundarlagið hjá vinnuni alla tíðina var støðugt.
Sitandi samgonga hevur valt at taka nógv minni inn frá uppsjóvarvinnuni, 55 mió. kr. minni longu í 2020. Samstundis er raksturin øktur munandi á fleiri økjum.

Undirritaði metir tí ikki, at tað er ráðiligt at fremja yvirtøkur, so leingi fíggjarliga støðan hvørki er støðug ella haldfør.

Harafturat verður tað mett at vera umráðandi at hava starvsfólkaviðurskiftini í lagi, áðrenn yvirtøka av hesum málsøki verður framd. Tað hevur í hoyring verið ført fram av Politistafelag Føroya, at meirilutin av avvarðandi starvsfólkum eru ímóti, at málsøkið verður yvirtikið beint nú, orsakað av ótta fyri pensjónsviðurskiftum, eftirútbúgvingarmøguleikum v.m.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Høgni Hoydal) tekur undir við málinum og hevur hesar viðmerkingar:
Føroyska fólkið og føroyskir myndugleikar eiga sjálvsagt at hava ábyrgdina av og ræðið á síni egnu løgreglu, kriminalforsorg (brotsmálaumsorgan) og sínum egna ákæruvaldi. Eisini eiga vit aftur at fáa gongd á arbeiðið at fáa rættarskipanina undir føroyskt ræði.
Flestu fólk í Føroyum taka helst undir við, at føroyingar eru tjóð, og at vit skulu hava fólkaræði í Føroyum. Men í einum veruligum fólkaræði hevur fólkið í landinum sum minstamark valdið á tí lóggevandi, útinnandi og dømandi valdinum. Harumframt eru løgregla og ákæruvald millum týdningarmestu amboð í einum samfelag, sum hava heimild at tryggja, at lógir landsins verða hildnar, og at brot á lógir verða kannað, reist og revsað. Eitt fólk, sum ikki hevur ræðið á hesum, hevur ikki fult fólkaræði.
Í Føroyum hevur føroyska fólkið og Løgtingið ikki avgerðina og ábyrgdina av, hvussu løgreglan skal arbeiða og fara fram, hvussu fólk verða ákærd og dømd, og hvussu fongsulsverk og revsing fer fram í okkara egna samfelag og mótvegis okkum sjálvum.

Føroyska løgreglan varð løgd undir Danmark
Tað er rættiliga marghátligt, at vit eru í hesi støðu sum tjóð. Føroyar hava elsta ting í Evropa, og okkara aldargamla Løgting hevði sum høvuðsuppgávu at gera lóg, at døma og at revsa í okkara egna landi. Landið varð seinni skipað í sýslur, har lokalir myndugleikar høvdu uppgávuna at útinna lóg og rætt.
Men Løgtingið misti so við og við sítt vald, og valdið varð tikið til tað miðsavnaða valdið í Keypmannahavn, uttan at Føroya fólk varð spurt ella góðtók tað. At enda varð Løgtingið niðurlagt, uttan at Føroya fólk varð eftirspurt.
Enn livdu tó summar lógir og siðvenjur, sum vórðu grundaðar í okkara egnu søgu og løgdømi.
Í frálíku bókini hjá Hjartvardi E. Skálagarð “Politiið í Føroyum fyrr og nú” er søgan hjá løgregluni í Føroyum lýst. Høvundurin vísir á, at í nýggjari tíð vóru tey fyrstu løgreglufólkini sett hjá kommununum. Sýslumenninir kring landið fingu seinni ábyrgdina av at vera lokal leiðsla fyri

løgregluna saman við øðrum uppgávum í føroyskum gerandislívi við grindaskifti, samskifti við myndugleikar o.s.fr.
Men eftir Heimastýrislógina í 1950'unum gjørdu Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin av at leggja løgregluna undir danskt vald. Hetta er helst tann størsta "øvugta yvirtøkan", ið hevur verið framd undir heimastýrisskipanini.

Miðsavningin og umstøðurnar hjá løgreglu og fongsulsverki seinastu árini
Í mong ár hava viðurskiftini hjá løgregluni og ikki minst fongsulsverkið og umstøðurnar hjá dømdum fólki og starvsfólki als ikki verið nøktandi. Tað er ikki, fyrr enn vit sjálv taka ábyrgdina av hesum grundleggjandi viðurskiftum, at nakað veruligt verður gjørt, og at menningin fer fram. Tað hevur søgan prógvað í øllum málum, sum føroyingar hava tikið ræðið á.
Seinastu 10-15 árini er løgreglan í Føroyum alt meira løgd undir sentralstýring úr Keypmannahavn. Í Danmark er framdur tann sonevndi "politireformurin", har Føroyar eru vorðnar ein av teimum donsku "politikredsunum". Lokal leiðsla og leikluturin hjá løgregluni á staðnum er nógv broytt. Fyri Føroyar hevur hetta merkt, at tann aldargamla siðvenjan, har sýslumenn vóru leiðarar á politistøðunum kring landið, samstundis sum teir røktu uppgávur við grindabýti, landbúnaðarstevnu, grannastevnu, friðingarmálum, útlendingamálum, passmálum o.s.fr., er niðurløgd.
Politistøðir kring landið eru niðurlagdar – og leiðslan í løgregluni er alt meira vorðin eitt dagligt samskifti við sentralstýringina í Keypmannahavn, har leiðarar eisini verða valdir og sendir til Føroya at stýra.
Harvið hava vit mist tað søguliga tilknýtið til okkara egnu lógir og siðvenjur kring landið – og tann gerandisliga partin av virkseminum hjá sýslumonnum og løgreglu – har tey taka sær av øðrum uppgávum enn tað, sum vit vanliga skilja sum beinleiðis politimál.
Seinasta árið er donsk lóggáva sett í gildi í Føroyum, har løgreglan hevur fingið lógarásettar heimildir mótvegis føroyska fólkinum. Ein donsk lóggáva fyri donsku fregnartænastuna PET er sett í gildi, sum gevur PET rætt at avlurta og skráseta allar føroyingar – enntá at avlurta og skráseta lógligt virksemi hjá politiskum flokkum, landsstýri og Løgtingi. Føroyskir myndugleikar hava ikki nakra ávirkan á ella innlit í hetta virksemið hjá PET.
Fyri Tjóðveldi er tað óskiljandi, at meirilutin á Løgtingi góðtekur hetta, heldur enn at taka ábyrgdina av hesum grundleggjandi viðurskiftum hjá øllum Føroya fólki.

Allar fyrireikingar eru gjørdar og klárt er at yvirtaka
Vit hava allar førleikar at skipa føroyska løgreglu, ákæruvald og brotsmálaumsorgan undir føroyskt fólkaræði. Allar fyrireikingar og samráðingar við danskar myndugleikar vóru lidnar longu í 2003. Og við málinum liggur drúgv frágreiðing frá føroyskum og donskum embætisfólkum, ið viðger allar tættir og vísir á, hvussu viðurskiftini eiga at skipast, tá ið málini koma undir føroyskt vald.
Undir viðgerðini av málinum í Uttanlandsnevndini er greitt komið fram:

- At tær dagførdu kostnaðarmetingarnar á 120 mió. kr. árliga eru rætt mettar.
- At enntá er lagt upp fyri betringum, so at til ber at skipa eina framkomna føroyska løgreglu við dagførdari útgerð.
- At til ber at keypa tænastur úr útlondum til størri kanningar og til at viðgera brotsverk tvørturum landamørk.
- At skipa eina føroyska løgreglu, har lokala leiðslan verður styrkt og verður bygd á føroysk viðurskifti.
- At útbúgvingaravtalur kunnu skipast.

- At við freistini til 1. januar 2022 er høvi at gera allar neyðugar avtalur lidnar, sum frágreiðingin hjá føroyskum og donskum embætisfólkum vísir á og mælir til.

Starvsviðurskifti
Føroya Politistafelag hevur undir viðgerðini spurt, hvussu starvs- og lønarviðurskifti verða skipað, tá ið løgreglan er yvirtikin. Tey viðurskiftini eru skipað við lóg, soleiðis at øll starvsfólk, ið fara undir føroyskan myndugleika, eru tryggjað lønarstig, starvsaldur, pensjónsviðurskifti v.m.
Hartil er at siga, at møguleikarnir hjá føroyskum løgreglufólki at fáa leiðslustørv og at mynda menningina hjá føroysku løgregluni verða munandi betri, tá ið ein føroysk løgregla er farin at virka.

Hvat er best fyri føroyska samfelagið?
Síðani hetta uppskotið um at taka ræðið á løgreglu, ákæruvaldi og brotsmálaumsorgan varð lagt fram fyrstu ferð í vár, eru nógv viðurskifti, ið hava víst á týdningin av at hava ræðið á egnum viðurskiftum – eisini í løgreglumálum.

- Samstarvið við løgregluna hevur verið gott í koronufarsóttartíðini, men ongin ivi er um, at ábyrgdin hjá Løgtingi og landsstýri og møguleikin at handla, er munandi betri, um vit sjálv hava ræðið á løgreglu, markaeftirliti, farsóttarnevnd og øllum tí, ið hartil hoyrir.
- Rúsevnamálini, ið nú verða viðgjørd í samfelagnum og á Løgtingi, eru eisini mál, ið uttan iva verða tikin í nógv størri álvara og tað gevur betri møguleikar at leggja og fremja egnar ætlanir hjá føroyskum myndugleikum, tá ið við taka ábyrgd av løgregluni.
- Tilbúgvingarsamskipanin hjá føroyskum myndugleikum verður uttan iva eitt munandi meira ábyrgdarfult mál á Løgtingi og í landsstýri, tá ið vit hava tikið ábyrgdina av løgregluni aftur.
- Fongsulsviðurskiftini hjá føroyskum fangum áttu langt síðan at verið betrað. Nú standa vit sum áskoðarar í fjølmiðlunum, meðan donsk fólkatingsumboð av og á hava tosað um hesi viðurskifti. Seinast við løgnum tíðindaskrivum um, at 1,5 mió. skal setast av til at kanna viðurskiftini. Var talan um eitt føroyskt málsøki, høvdu vit aldri góðtikið støðuna, tað endaleysið drálið og uttanumtosið í hesum máli so leingi.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin til at taka undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Uttanlandsnevndin, 10. desember 2020

Bill Justinussen formaður	Brandur Sandoy næstformaður	Frimodt Rasmussen
Jaspur Langgaard	Heðin Mortensen	
Høgni Hoydal	Beinir Johannesen	